# Akfar undir 3500 kg

*Skjal við upplýsingum um akfør undir 3500 kg*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um akfør undir 3500 kg. Tá ið skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú ert vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel. 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Tryggingin fyri akfar undir 3500 kg er í høvuðsheitum í tveimum. Annað er lógarkravda ábyrgdartryggingin, ið fevnir um skaða, sum tú við bilinum gert á fólk, lutir og ognir hjá øðrum. Hitt er skrokktryggingin, ið fevnir um skaðar, sum tín bilur fær. Afturat hesum kanst tú tekna ymisk tilval, so tryggingin svarar til júst tín tørv.

### Hvat dekkar tryggingin?

**Ábyrgdartryggingin**
Veitir endurgjald fyri skaðar, sum tú við bilinum gert á ognir/lutir hjá øðrum og á fólk.

**Skrokktryggingin**
Veitir endurgjald fyri skaðar, sum bilurin fær. Er bilurin yngri enn eitt ár og gerst vrak, svarar endurgjaldið til kostnaðin av einum tilsvarandi nýggjum bili av sama merki, slagi og árgangi. Er akfarið eldri enn eitt ár, svarar endurgjaldið til ta peningaupphædd, sum akfarið er vert, tá ið skaðin hendi. Upphæddin fyri eykaútgerð, sum tú hevur valt, sæst í tryggingarskjalinum.

**Dekningar**
Í tryggingini eru hesir dekningar
– alt eftir hvørji tilval, tú hevur valt.:

- ✓ **Ábyrgdartrygging**
- ✓ **Føraravanlukkutrygging**
  (ískoyti til ábyrgdartrygging)
- ✓ **Flutningstrygging**
  (ískoyti til ábyrgdartrygging)

- ✓ **Skrokktrygging**
- ✓ **Nývirðisendurgjald**
- ✓ **Lyklafulnað**
- ✓ **Rættarhjálp**
- ✓ **Skeiv áfylling**
- ✓ **Nummarplátustuldur**
- ✓ **Sálarfrøðilig kreppuhjálp**

Tú kanst eisini velja hesi ískoytini til skrokktryggingina.

- ✓ **Serskaði**
- ✓ **Mekaniskur skaði**
- ✓ **Tiltaksakfar**
- ✓ **Fíggjarmiss**
- ✓ **Parkeringsskaði**
- ✓ **Bilhjálp í Føroyum**

Les meiri á heimasíðuni **www.trygging.fo**

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um skaðar, sum akfarstryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- x Skaða á egnar ognir (bygning, garð v.m.)
- x Evnistroyttleika
- x Avmonteraða útgerð og tilhoyr til tryggjaða akfarið (t.d. vetrar- og summardekk), sum ikki verða goymd í forsvarliga læstum rúmi.
- x Skaðar, sum koma orsakað av veðurlagnum, so sum rustur og frostspreingingar.

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um skaðar, sum akfarstryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit sært tú í tryggingartreytunum.

- ! Skaðar, sum henda, tá akfarið er útleigað
- ! Skaðar, sum henda, tá førarin ikki hevði koyrikort
- ! Brennievni, sum verður mist ella stolið
- ! Skaðar, sum standast av, at akfarið hevur eitt ella fleiri dekk, sum ikki lúka minstukrøvini til mynsturdýpd sambært lóg ella kunngerð

**Betri Trygging P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Tel. + 298 348 600
betri@trygging.fo
**www.betri.fo**

betri trygging

# Akfar undir 3500 kg

*Skjal við upplýsingum um akfør undir 3500 kg*

## Sjálvábyrgd

Fyri skrokktryggingina er sjálvsábyrgd galdandi. Tú sært tína sjálvábyrgd í tryggingarskjalinum

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar skaðar, sum henda í Føroyum. Uttanfyri Føroyar dekkar tryggingin skaðar, sum henda í londum har tað grøna og reyða kortið eru galdandi. Verður akfarið brúkt uttanlands longri enn tríggjar mánaðir, skalt tú boða Betri Trygging frá.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.trygging.fo, ella á tel 348 600.
- Royn við tað sama at avmarka skaðan
- Set teg í samband við okkum, áðrenn tú koyrir akfarið á verkstað, uttan so at serligar umstøður gera, at tað er bráðneyðugt at umvæla ella flyta akfarið
- Tjóvarí- og herverksskaðar skulu fráboðast løgregluni við tað sama, tú varnast skaðan

**Tá ið broytingar eru**

- Boða okkum frá broytingum í sjálvum akfarinum og nýtsluni av akfarinum
- Boða frá, um akfarið verður brúkt uttanlands longri enn tríggjar mánaðir

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga. Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til høvuðsgjaldsdagin.
Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir at ein skaði er útgoldin ella avvístur.

**Betri Trygging P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Tel. + 298 348 600
betri@trygging.fo
**www.betri.fo**